Semja millum:

**Kommunulæknafelag Føroya** øðrumegin

og

**Fíggjarmálaráðið** hinumegin

Partarnir eru samdir um at gera niðanfyri standandi broytingar í §2 avtalu frá 5. oktober 2007, í §2 avtalu frá 10. februar 2011 og í ískoytisavtalu frá 1. oktober 2010.

1. Partarnir eru samdir um, at um lækni gerst sjúkur, skal Heilsutrygd frá 1. juli 2023 rinda honum basisgjaldið umframt grundlønina, meðan hann er sjúkur. Samstundis skal læknin frá sama degi avhalda allar útreiðslur til síni starvsfólk.

   Hetta merkir, at §1, stk. 1 í Ískoytisavtalu millum Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið frá 1. oktober 2010 verður strikað, og at partarnir broyta reglurnar fyri útgjald úr Administrationsfonden, soleiðis at endurgjald ikki verður veitt fyri basisgjald.

2. §2 avtala frá 5. oktober 2007 verður tillagað sambært hjáløgdu fundarfrásøgn frá fundi millum Heilsumálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya tann 4. mai 2023.

3. §3 í avtalu frá 10. februar 2011 verður broytt til at vera soljóðandi:

   "Vaktargjald verður goldið soleiðis:

   - Visiterandi lækni:
     - Kl. 16:00 – 22.00 gerandisdagar: Samsýning 1.035,00 kr fyri tíman
     - Kl. 22.00 – 08:00 gerandisdagar: Samsýning 1.255,00 kr fyri tíman
     - Kl. 12:00 – 08:00 hálvar frídagar: Samsýning 1.255,00 kr fyri tíman
     - Vikuskifti og halgidagar alt døgnið: Samsýning 1.255,00 fyri tíman

   - Visiterandi lækni fær fasta tímasamsýning og ikki veitingar sambært sáttmálanum, Overenskomst om almen lægegerning mellem MSF/AHR og KLF/PLO frá 1. Okt. 2006.

   - Koyrilækni:
     - Samsýning 146,40 kr fyri tíman. Harumframt verður goldið fyri veitingar.
     - Umframt hetta er galdandi fyri Suðuroy, at tá neyðugt verður vegna læknatrot at innkalla kommunulækna at hava vakt meira enn eina viku hvørja fjórðu viku, er samsýningin frá 8. degi 2 x 146,40 kr fyri tíman.

4. Punktini 2 og 3 í hesi semju eru ikki galdandi fyri Sandoy, har verandi skipan heldur fram óbroytt, inntil Sandoyggin, tá Sandoyartunnilin letur upp, verður partur av meginøkinum.

   Serskipan fyri Suðuroynna.
5. Umframt grundgjaldið (§5 í sáttmálanum frá 2008), fær fastur kommunulækni, sum røkjur eina viðtalu í Suðuroy eina eyka viðbót, sum er ½ grundgjald.

6. Partarnir binda seg harafturat til, at samanskriva hjáløgdu fundarfrásøgn frá 4. mai 2023 saman við omanfyri nevndu § 2 avtalum, soleiðis at vaktarskipanin í síni heild verður lýst í sama skjali.

Henda semja heldur fram óbroytt, inntil hon verður søgd upp av øðrum partinum, tó í fyrsta lagi 1. juni 2025, ella í sambandi við broyting í Overenskomst om almen lægegerning frá 27. juli 2006.

Tórshavn 14. juni 2023

*Vegna*
*Fíggjarmálaráðið*

*Ruth Vang*
*landsstýriskvinna*

*Jan Mortensen*
*Lønarstjóri*

*Vegna*
*Kommunulæknafelag Føroya*

*Marius Dam*
*formaður*

*Rói á Kósini*
*næstformaður*

*Dorrit Bech Joensen*
*Nevndarlimur*